Borgarstjórin boðin til Amerika

Í døgunum frá 2. — 28. mai er borgarstjórin í Havn boðin til USA.

Tað er amerikanska sendistovan í Danmark vegna amerikansku stjórnina, sum stendur fyri innbjóðingini.

Høvi verður hjá borgarstjórunum m.a. at skifta hugskot við aðrar borgarstjórar, tosa um og kanna spurningar, ið eru frammi í dag og at vitja ymsar stovnar. Innbjóðingin fatar eisini um rundferðing í USA.

Evni fyri ráðstevnuni:

»Aktuel evni í statsligum og lokalum stýrum«.

Skrá fyri túrin:

Leygardagin 30. apríl: Luttakararnir koma til Washington.

Sunnudagurin 1. mai: Verður brúktur til at hvíla seg í og »orientering«.

Mánadagurin 2. mai: Ráðstevnan byrjar. Evni: »Aktuel evni í statsligum og lokalum stýrum«.

Ráðstevnan er ætlað at upplýsa luttakararnar um stýrisskipanina í USA og at »diskutera« hvussu gongdin hevur verið við økisskipanini (regionals.) og at geva luttakarunum møguleika at seta seg inn í aktuel evni viðvíkjandi statsligum og lokalum stýri.

Fundir fara eisini at vera við umboð úr Hvítu Húsunum, sum hava við lokalstýri at gera og við landssambandi hjá guvernørum og kommunum.

Á Capitol Hill verða fundir við embætisfólk í evndini, sum hevur við »projektir« hjá stjórnini at gera.

Bólkurin fer møguliga eisini at hitta kanningarstarvsfólk hjá kongressini viðv. lóggávu um millumstjórnarspurningar.

Frá 7. — 11. mai : Vitjað verður í Springfield, Massachussets:

Seinastu 20 árini hava tey har vesturi í Massachussets mist nógv av eimum stóru framleiðslurkjunum og hava gjørt øyndir við at fáa nýggjan ídnað.

Skráin her verður m.a. at siggja, hvat nakrir býir gera við hendan spurningin.

Gestirnir skulu eisini kanna samstarvið millum akademikarar, politikarar og privatar fyritøkur um at loysa teir figgjarligu trupulleikarnar.

Ein annar stórur spurningur á hesum øki er, hvussu slepst av við burturkast. Fundur verður við ein lokalan umhvørvisembætismann um hetta evnið.

Frá 11. — 14. mai: Vitjað verður í Pittsburg, Pennsylvania:

Hetta er ein av teimum týdningarmestu býunum í »Rustbeltinum«, sum hevur verið fyri niðurgongd í stálídnaðinum, og sum »hevur svarað aftur« við nýggjum búskaparligum menningarætlanum, og sum hevur eydnast at fáa á føtur nýggjan ídnað.

Bólkurin skal vitja ein »regionalan« (landsparta-) menningarstovn, sum fremur altjóða handil og investeringar og eisini at kunna seg við, hvussu teir bera seg at við at fáa nýggjan ídnað til økið.

Sambandið millum arbeiðsmegi og arbeiðsgevarar verður umrøtt á einum pallborðsfundi, sum verður leiddur av Ben Fisher, ið er stjóri fyri kanningardeildini fyri ardeildini á universitetinum Carnegie-Mellon.

Eisini verður vitjað á einum ídnaðarvirki.

Frá 14. — 19. mai: Vitjað verður í Portland, Oregon:

Teir norðastu statirnir við Stillahavið leggja stóran dent á at fylgja einum búskapi, sum er ætlaður handilsmøguleikum saman við eini vaksandi útbúgvingarætlan í háteknologi fyri at økja um kappingarføri.

Av øllum teimum havnarbýum har vesturi hevur Portland tann størsta útflutningin, og grannastatirnir við Stillahavsstrondina eru teir størstu handilsfelagarnir.

Samstundis hevur Oregon, sum fær stóran part av inntøkunum frá træídnaðinum, verið fyri búskaparligari afturgongd.

Hvussu roynt verður at venda hesari afturgongd, verður kjakast um á einum fundi.

Umhvørvisevni so sum kjarnorkuverk, vatndálking og skógardeyði verða eisini viðgjørd.

Ein pallborðsfundur verður við umhvørvisráðið í Oregon, umhvørvisfelagsskapin Thousand Friends og lokalar embætismenn.

17. mai fer bólkurin at fylgja við primervalinum í Oregon og fer eisini at fáa frágreiðing frá tí ovasta valembætismanninum, sum fer at greiða frá valprocessini.

Bólkurin fer at vitja valstøð og tosa við lokalar floksformenn og møguliga við nakrar av kandidatunum til tey statsligu embætini.

Frá 19. — 22. mai: Vitjað verður í Sand Diego, California:

Her fer stórur dentur at verða lagdur á lógliga og ólógliga tilflyting. Kunning verður um ta nýggju immigratiónslógina og býarætlanir, hvussu man skal hýsa og útbúgva immigrantum.

Skráin fevnir eisini um býarplanir og serliga ungdómsverkætlanir.

Frá 22. — 25. mai: Vitjað verður í Lincoln, Nebraska:

Temaið á hesi vitjanini verður jarðarbrúksmenning og kreppa innan jarðarbrúki.

Universitetið í Nebraska, sum hevur eina stóra jarðarbrúksdeild, samarbeiðir við lokalar politikarar og statsjuristar um menningarætlanir.

Stjórin fyri jarðarbrúkskanningunum í Mead fer at møtast við bólkinum, og bólkurin fer eisini at vitja ein stóran bóndagarð (farm) og eisini at hitta ráðslimir í tí lokala bankanum. Hann fer at greiða frá tí búskaparliga bygnaðinum í einum lítlum jarðarbrúksfelag.

Eisini fer bólkurin at fáa eina frágreiðing um búskaparligu støðuna í statinum og eisini at vitja eina jarðarbrúkskreppumiðstøð, sum skipar fyri endurútbúgving.

Frá 25. — 27. mai: Vitjað verður í Atlanta, Georgia:

Hesin býurin verður mettur at vera tann 3. skjótast vaksandi býurin í USA.

Skráin her verður at kanna tann vaksandi háteknologiska ídnaðin og tænastuídnaðin við fundum um búskaparligar útrokningar frá Georgia universitetinum, og fund við stjóran í mideplinum fyri nýhugsan.

Eisini verður roynt at fáa ein fund við ein av stjórunum fyri Coca Cola um útlitini fyri lokalum vøkstri.

Skráin endar við einum »evalueringsfundi«, sum USIA skipar fyri.

Tá ið skráin í Atlanta er liðug, verður møguleiki hjá luttakarunum at fara til New York at halda weekend.

28. mai verður síðsti dagurin á túrinum, og roknað verður við, at luttakararnir fara heim aftur 29. mai.

Mánaðarjavni pr. ultimo mars 1988

SJÓVINNUBANKIN

DEBET		kr.
1.	Kassapeningur	19.302.984
2.	Danmarks Nationalbank	0
3.	Innanlanda bankar og sparikassar	56.443.444
4.	Útlendskir bankar v.m.	32.984.841
5.	Lánsbrøv	416.174.855
6.	Pantibrøv v.m.	394.204
7.	Partabrøv v.m.	10.253.000
	(Av hesum egin partabrøv nom. kr. 360.200)	
8.	Útlán:	
	8.1. Útlán við heimild til skiftandi nýtslu	874.482.078
	8.2. Vekslar	49.782.402
	8.3. Byggilán	345.285.899
	8.4. Veðlán	841.525.715
	8.5. Onnur útlan	215.488.493
	Útlán ialt	2.326.564.587
9.	Ábyrgdir	931.517.063
	(Egin partabrøv millum trygdir undir 8 og 9 eru nom. kr. 1.128.500)	
10.	Fastar ognir	62.594.108
11.	Búnyttur	13.032.482
12.	Aðrir skuldarar	14.320.978
13.	Kostnaður	16.994.585
	Debet ialt	3.900.577.131
	Ogn uttanlands	35.374.201
	Keyp av fremmandum valuta á termin	199.690.431

KREDIT		kr.
1.	Innlán:	
	1.1. stytri uppsøgn enn 1 mánað	663.217.170
	1.2. uppsøgn uppá 1 mánað upptil 12 mánaðir	43.305.857
	1.3. uppsøgn uppá 12 mánaðir ella meir	1.553.895.076
	1.5. Serinnlán	9.986.957
	Innlán ialt	2.270.405.060
2.	Danmarks Nationalbank	134.970.849
3.	Innanlanda bankar og sparikassar	162.381.985
4.	Útlendskir bankar v.m.	21.864.502
5.	Ábyrgdir	931.517.063
6.	Ymiskir ognarar	27.970.881
7.	Rentur og provisjón	45.054.706
9.	Eginpeningur:	
	9.1. Partapeningur	50.000.000
	9.2. Tiltakspeningur	256.412.085
	Eginpeningur ialt	306.412.085
	Kredit ialt	3.900.577.131
	Skuld uttanlands	24.072.341
	Søla av fremmandum valuta á termin	179.139.283